# 83 ára gamal føldi upp á abbadótrina

**Føroya Rættur dømdi fríggjadagin ein nú 83 ára gamlan mann fyri at hava verið ónærisligur móti eini abbadóttir síni. Maðurin fekk tveir mánaðir treytaða fongsulsrevsing**

Leo Poulsen

Fríggjadagin var eitt mál fyri í Føroya Rætti, har ein abbi var ákærdur fyri at hava verið ónærisligur móti einari av abbadóttrum sínum.

Misbrotini eru farin fram í tíðarskeiðinum 2004 til 2008, tá gentan hevur verið millum 11 og 15 ár.

Meginparturin av ákærunum myndaðu seg í, at maðurin hevur følt gentuna á bringuna, umframt aðrar ákærur. Hesum noktaði maðurin ikki fyri, men segði, at hetta var hent í sambandi við, at hann hevði róst abbadóttrini fyri at hava eina vakra bringu, og at hon átti at verið modell.

Maðurin greiddi frá, at hendan abbadótturin var meira kelin enn hini abbabørnini, og mussaði og klemmaði meira.

Forholdið við abbabørnini sum heild vóru góð og tað var forholdið til mammu hesa abbadóttrina eisini. Maðurin játtaði eisini, at hann hevur nomið við bróstini á verdóttrini, og at hetta eisini var gjørt í »besta forstáilsi«.

Sama var við abbadóttrini, sum hann fleri ferðir hevði klappa á bringuna og í endan. Men hetta var altíð tikið við einum smíli, vildi maðurin vera við.

Maðurin segði seg tí gerast ovfarnan, tá sonurin konfronteraði hann við ákærunum um siðamisbrot móti abbadóttrini.

### Hurðarnar afturlætnar

Maðurin segði, at alt hetta er íkomið eftir at abbadótturin hevði havt eina temaviku um kynsligan ágang, og abbin spekuleraði í, um onkrar av vinkonunum í skúlanum høvdu verið úti fyri kynsligum ágangi, og at hetta hevði sett okkurt í gongd hjá gentuni.

Hetta málið skuldi verið fyri í heyst í Føroya Rætti, men táverandi verjin hjá manninum »flippaði út«, tá hann ikki fekk viðhald í, at málið skuldi roynast fyri afturlætnum hurðum, og segði seg ikki vilja verja mannin, vórðu hurðarnar ikki afturlætnar.

Hann skjeyt eisini avgerðina hjá dómaranum um opnar hurðar inn fyri landsrættin, men landsrætturin gav dómaranum rætt. Kortini noktaði dómarin ikki fyri, at hurðarnar vórðu afturlætnar, tá gentan gav sína vitnisfrágreiðing.

Hendan vitnisfrágreiðing var so mikið sannførandi, at dómarin valdi at døma 83 ára gamla mannin í tveir mánaðar treytaða fongsulsrevsing.



*Tann nú 83 ára gamli maðurin er dømdur fyri at hava følt upp á abbadóttur sína*

*Modellmynd*

# Rúsevnissølumaður varðhaldsfongslaður

**Fríggjadagin var ein maður fyrst í 5-unum varðhaldsfongslaður í grundlógaravhoyring fyri at hava rúsevni í varðveitslu, við sølu fyri eyga**



*Sambært løgregluni er maðurin gamal kenningur, og róptur pushari og bakmaður*

Leo Poulsen

Fríggjadagin seinnapart var ein maður førdur í grundlógaravhoyring, skuldsettur fyri at selja rúsevni.

Maðurin varð tikin síðst í oktober, tá hann royndi at smugla 150 gramm av hassj og fýra gramm av amfetamin inn í landið, men hann varð kortini leyslatin tá.

Hóskvøldið varð maðurin tikin undir einari húsarannsókn, har løgreglan fann seks gramm av amfetamin umfram 20 gramm av ymiskum rúsevni umframt rohypnol, sum verður brúkt til drug-rape (gentur verða doyvdar og neyðtiknar).

Maðurin er eisini undir illgruna fyri at býta rúsevni fyri sex til ungar gentur.

Ákærin vildi hava mannin varðhaldsfongslaðan í 14 dagar, meðan málið verður kannað meira, og tað gekk dómarin við til. Maðurin verður varðhaldsfongslaður í isolatión í 14 dagar.

Maðurin noktar seg sekan og sigur, at rúsevnini bert vóru ætlað honum sjálvum.

# Herverk gjørt á 12 bilar

**Løgreglan hevur fingið fráboðan um herverk, sum er framt móti 12 bilum, 10 á Bursatanga í Havn og tveir í Miðvági. Løgreglan hevur eingi spor at ganga eftir**

Løgreglan hevur fingið eitt rímiliga stórt mál at taka sær av. Heilir 12 bilar hava fingið skaða sunnunáttina, tá gerningsmaður ella gerningsmenn hava snarað speglini av bilunum.

10 av bilunum stóðu parkeraðir á parkeringsøkinum á Bursatanga, og speglini í báðum síðum vóru snarað av. Sambært vakthavandi á løgreglustøðini kann eitt slíkt dýrt spegl skjótt leypa upp í einar 3.000 krónur, og er talan um 24 spegl, er lætt at rokna út, at tað gerst ein dýrur umgangur fyri gerningsmenninar.

– Vit hava ikki nøkur spor at ganga eftir, og tí heita vit á fólk, sum hava sæð nakað, um at venda sær til løgregluna. Tað er ikki neyðugt hjá fólki at uppgeva navn, so tað er ikki at halda seg aftur, um nakar hevur sæð nakað, sigur vakthavandi.

Í morgun kom ein fráboðan um, at onkur hevði roynt at brotið inn í kioskina umborð á Enniberg. Viðkomandi hevur brúkt brandøksina at bróta hurðina inn við, men málið er so feskt enn, at løgreglan ikki veit meiri at siga.

Í gjárkvøldið varð boðað frá royki í einum húsi, og løgregla og brandlið kom skjótt á staðið. Tað vísti seg kortini, at tað var oljufýringin, sum reyk.

Annars var lítið at boða frá. Eitt sindur av húsaófriði, leysir hundar og full fólk var tað, sum løgreglan annars tókst við um vikuskiftið.



*10 bilar á Bursatanga og tveir í Miðvági hava fingið somu viðferð – speglini eru snarað av*

*Mynd: Leo Poulsen*